# Hópin av fólki á landsfundi hjá Fólkaflokkinum



*Gallarí Jinx var stúgvandi fult av fólki fríggjakvøldið, tá ið Suðurstreynoyar Javnaðarfelag skipaði fyri politiskum hugnakvøldi*

## Politiskur hugni á Gallarí Jinx

**Javnaðarflokkurin hevði fríggjakvøldið væleydnað hugnakvøld á Gallarí Jinx**

VALSTRÍÐ
*Bartal Nolsøe Poulsen*

Seinastu árini eru nýggir hættir at føra valstríð komnir fram. Undan valinum í 2002 skipaðu fleiri av politisku ung-manna-feløgunum fyri væleydnaðum kjakfundum á Café Natúr, og í ár hevur Florentze á Skipagøtu, sum eigur og rekur Gallarí Jinx á Áarvegnum, so tikið stig til líknandi tiltøk.

– Eg havi vent mær til allar teir politisku flokkarnar at vita, um áhugi er fyri at nýta hølini hjá mær til eitthvørt politiskt tiltak í januar mánaða, sigur Florentze á Skipagøtu. Hon sigur, at nakrir flokkar hava sýnt stóran áhuga, men enn er tað bara Javnaðarflokkurin, ið hevur tikið stig til nøkur ítøkilig tiltøk; og tað fyrsta fór av bakkastokkinum fríggjakvøldið, tá ið javnaðarfólk og onnur savnaðust á hugnaliga gallarínum til politiskt hugnakvøld, har Sámal Ravnsfjall skipaði fyri felagssangi.

Katrin Gaard, sum er virkandi formaður í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag heldur, at tiltakið, ið nú hevur latið upp fyri valstríðnum, var væleydnað. – Tað var ætlað sum eitt hugnakvøld, har veljarir høvdu møguleika at møta valevnunum hjá flokkinum. Hon sigur, at felagið ætlar at skipa fyri afturvendandi fundum í gallarínum á Áarvegnum hvørt fríggjakvøld fram til valið.

### Nýhugsan

Katrin Gaard fegnast um nýggja møguleikan at røkka fólki við politiska boðskapinum hjá felagnum. – Hetta er ein nýggjur máti at gera tað uppá. Tað vísir seg, at valfundir av tí gamla slagnum megnað ikki at savna eins nógv fólk nú sum fyrr, og vit mugu finna uppá nýggjar hættir at koma í samband við fólk. Tað krevur eitt sindur meira at savnað fólk til politiskt kjak, so um vit ikki megnað at savna fólk, mugu vit fara til teirra.

Katrin Gaard væntar at Suðurstreymoyar Javnaðarfelag saman við hinum politisku valfeløgunum í høvuðsstaðarøkinum fer at skipa fyri politiskum kjakfundum komandi tíðina, umframt tey tiltøk, sum felagið hjá henni stendur fyri í leigaðu hølunum á Bládýpinum. Har hava tey café hvønn dag fram til valið, umframt størri og smærri tiltøk.







**Anfinn Kallsberg er enn løgmansvalevni hjá Fólkaflokkinum, sum ætlar at verða snúningsdepil í komandi samgongusamráðingum**

VALSTRÍÐ
*Bartal Nolsøe Poulsen*

Fólkaflokkurin hevur um vikuskiftið havt landsfund í Tórshavn. Óli Breckmann, formaður Fólkafloksins á tingi sigur, at sjáldan hava so nógv fólk møtt á landsfundi hjá flokkinum sum leygardagin. Hann metir, at um 220 fólk vóru í Pálsstovu um vikuskiftið, og tað er tvífalt so nógv, sum vanliga leita sær á fund. Óli Breckmann fegnast um stóru undirtøkuna, fundurin fekk, og hann er ikki seinur at tengja hana at viðferðini, sum Anfinn Kallsberg hevur fingið frá Tjóðveldisflokkinum seinastu tíðina.

- Fólkafloksfólk møttu manssterk at vísa sín stuðul til flokkin og løgmann. Lagið var av tí besta, og tað kendist veruliga, at fólk rættiliga ætlaðu sær at stríðast fyri einum góðum úrsliti, sigur Óli Breckmann.

Fundurin var so skipaður, at løgmaður fyrst greiddi frá gongdini í málinum, sum førdi til at samgongan varð uppsøgd, og val varð útskrivað. Óli Breckmann legði síðani fram valskránna til komandi løgtingsval, og Jørgin Niclassen greiddi frá avrikunum hjá Fólkaflokkinum seinastu árini í samgongu.

### Anfinn løgmansevni

Tá ið vit spurdu Óla Breckmann, um flokkurin var vorðin samdur um eitt løgmansevni, um so verður, at Fólkaflokkurin kemur í samgongu eftir valið, svaraði hann, at flokkurin enn sum áður stendur saman um Anfinn Kallsberg. Hann helt tað vera láturligt, at teir stóru flokkarnir skulu vera so støðufastir í at nokta eina samgongu við Kallsberg sum løgmanni, tá ið helvtin av Føroya fólki er samt um, at Anfinn Kallsberg er best egnaða løgmansevni sum er. Sambært Óla Breckmann er tað bert kávalótir, tá ið Tjóðveldisflokkurin noktar at fara í eina samgongu við Anfinni Kallsberg sum løgmanni. Hann væntar eisini, at Sambandsflokkurin fer at koma á aðrar tankar, um so verður, at hann og Javnaðarflokkurin ikki fáa einsamallan meiriluta á løgtingi eftir 20. januar.

### Fólkaflokkurin snúningsdepil

Óli Breckmann sigur, at flokkurin miðar eftir at gerast snúningspunkt í komandi samgongusamráðingum. Endamálið er, at ongin samgongumøguleiki skal vera uttanum Fólkaflokkin. – Um hetta skal eydnast mugu vit fáa ein tingmann aftrat, sigur Óli Breckmann við Sosialin.

Vit spurdu eisini Óla, um ósemjan um vallistan í Suðurstreymoyar valdømi var tikin upp til viðgerar, men so var ikki. – Tað er altíð keðiligt at missa eitt gott valevni av listanum, men vit vóna, at tey fólkafloksfólk, ið valdu Bjarta Mohr til seinasta val megna at finna eitt annað valevni á lista A, ið er næstan líka gott, tí listin er bæði breiður og djúpur.

## Lívligur fólkafundur

**Eini 300 fólk vóru savnað í Lærara-skúlahøllini á Frælsinum, tá Tjóðveldisflokkurin leygardagin skipaði fyri fólkafundi. Við einari blanding av seriøsum røðum, skemti, tónleiki og einum vælupplagdum Tobba megnaði Tjóðveldisflokkurin at skapa ein lívligan fólkafund í orðsins sanna týdningi**

FÓLKAFUNDUR
*Kristian E. Andersen*

Ein fullsett Læraraskúlahøll var leygardagin karmur um ein lívligan fólkafund hjá Tjóðveldisflokkinum. Á fundinum hendi eitt sindur av hvørjum, júst sum siðvenja er við føroyskum fólkafundum. Høgni Hoydal legði fram valskrá Tjóðveldisfloksins. Karin Kjølbro helt eina rørandi røðu. Sjúrður Skaale tosaði um tilfeingi og møguleikar Tjóðveldisfloksins í valstríðnum, og Tobbi var í essinum við einari kanónrøðu og sum garvillur fólkatónleikari saman við Sámali Ravnsfjall. Men ikki nokk við tí. Heri Simonsen, skemtari, megnaði at bjóða nærum hvørja tí einastu pissubløðru í salinum av við undirhaldandi, beinraknum og, til tíðir, heldur grovum skemti.



*Tobbi var í essinum á fólkafundinum leygardagin.*
*Mynd: Laufey H. Blaasvær*

### Væl nøgdir

– Vit megnaðu at savna eini 300 fólk til fundin, og tað eru vit sera glaður fyri, serliga tá hugsað verður um, at fundurin varð lýstir so stutt áðrenn, sigur ein av fyrireikarunum, Sjúrður Skaale, við Sosialin. Hann heldur áfram við at siga, at endamálið við fundinum var at nýta tað tilfeingið, sum flokkurin hevur, so gott sum gjørligt. Tí Tjóðveldisflokkurin hevur als ikki ráð til lýsingar hvønn tann einasta dag, sum aðrir flokkar hava.

– Onkur av hinum stóru flokkunum hevur kanska eini tríggjar ferðir so nógvar pengar sum Tjóðveldisflokkurin at nýta í valstríðnum. Tjóðveldisflokkurin hevur ikki ráð til tað øgiliga lýsingarátak, ið ávísir aðrir flokkar hava. Tað merkir so, at vit eru noyddir at nýta tað tilfeingið, ið vit hava. Og tað er so millum annað, at Tjóðveldisflokkurin kanska hevur meira virknar limir enn aðrir flokkar, greiðir Sjúrður Skaale frá.

### Avrikslistin

Sjúrður Skaale tosaði millum annað í røðu síni um tilfeingi og møguleikar Tjóðveldisfloksins í valstríðnum. Hann nevndi tann sokallaða avrikslistan, ið er ein listi, ið vísir á tey avrik flokkurin hevur gjørt síðan hann kom til í 1998.

– Tit hava sæð avrikslistan hjá Tjóðveldisflokkin fyri tey farnu seks árini. Eg tori at siga, at eingin flokkur nakrantíð hevur havt eitt so gott útgangsstøði til eitt valstríð, segði Sjúrður Skaale í røðuni.

Sjúrður Skaale nevndi, at hesin listin sigur nógv. Hann eigur at nýtast til at sannføra føroyingar um, at Tjoðveldisflokkurin hevur konkret, trúðvirðilig argument aftan fyri seg, og at møguleikar floksins í valstríðnum liggja aðrastaðni enn í dýrum vallýsingum.

– Støðan er altso tann, at Tjóðveldisflokkurin hevur øll kort á hondini til at vinna hetta valið. Tjóðveldisflokkurin eigur at vinna hetta valið. Hann eigur ikki at ganga aftur frá seinasta valið, hann eigur at ganga fram. Tað skal ikki vinnast í bløðunum. Tað skal partvís vinnast í sjónvarpi og útvarpi, men tað skal fyrst og fremst vinnast við hús og á arbeiðsplássum og í hondbóltsfeløgum og diskotekum og samkomuhúsum av øllum slag, helt Sjúrður Skaale áfram í røðuni.

### Tobbi brillieraði

Hæddarpunktið á fólkafundinum mann uttan iva hava verið Torbjørn Jacobsen. Umframt at halda eina av sínum klassisku kanonrøðum, ið summi elska og onnur hata, royndi hann seg sum fólkatónleikara saman við Sámali Ravnsfjall. Hóast tað kann diskuterast, hvussu góður sangari Tobbi er, mann einki vera at ivast í, at hann dugir at framføra. Luttakararnir skemtaðu sær í hvussu so er óført í at síggja buldrutta politikkaran royna seg sum buldruttan tónleikara.

### Onnur tiltøk

Sjúrður Skaale sigur at enda við Sosialin, at Tjóðveldisflokkurin ætlar sær at skipa fyri fleiri líknandi fundum í valstríðnum, og at stuttligt hevði verið, um undirtøkan hjá limum Tjóðveldisfloksins og øðrum áhugaðum hevði verið líka stór. Men at megna at savna 300 fólk enn einaferð, má skiljast sum at vera ein avbjóðing.